## Leiðari og varaleiðari til sambýli á Serforsorgarøkinum

Innan Almanna- og Heilsumálastýrið og stovnar undir tí, við tænastu inntil víðari á einum sambýli fyri brekað í Havn, er eitt tænastumannastarv sum leiðari og eitt sum varaleiðari leyst at søkja til setan 1. juli ella 1. august 2000.

Størvini verða sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag, leiðarastarvið lønt í lønarflokki 26 + viðbót og varaleiðarastarvið lønt í lønarflokki 20 + viðbót.

Sambýlið er undir uppbyggjan, men væntast at verða heim hjá 5 ella 6 fólkum við serligum tørvi vegna sálarligar trupulleikar. Uppgávan hjá leiðaranum er, saman við starvsfólkunum, at skipa ein tryggan og mennandi gerandisdag fyri íbúgvarnar.

Leiðarin hevur fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av sambýlinum. Uppgávan hjá varðaleiðaranum er at stuðla leiðaranum í leiðsluarbeiðinum og at yvirtaka leiðarans uppgávur, tá hesin ikki er til staðar.

Væntað verður av leiðaranum, at hann á ein leiðandi og virknan hátt, saman við starvsfólkunum kann tryggja sambýlinum eina positiva menning.

Týdningur verður lagdur á, at umsøkjarin hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir á pedagogiska økinum, hevur evni og vilja at samstarva á øllum økjum, er sjónligur í sínum leiðarastarvi og dugir at fáa síni sjónarmið fram.

Væntað verður av varaleiðaranum, at hann hevur samstarvsevni, vilja og evni at fáa arbeiðið í gerandisdegnum at ganga so væl sum gjørligt.

Bert fólk við pedagogútbúgving kunnu søkja størvini.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Bjarna Clementsen á tlf. 315426. Umsóknarfreistin er 20. juni 2000.

Umsóknir skulu sendast til:

**Serstovnadeildina**
Sigmundargøtu 5
FO-100 Tórshavn

## Árligi marknaðardagurin

verður í Vágsbotni 3. mai við m.a. rógving, kúlubað, sjókar við livandi fiski, fuglabergi, matsølu o.m.a.

Eisini verður nýggi brandbilurin vístur fram. Opið er frá kl. 10-18. Nógv ókeypis tiltøk.

Vegna luttakandi feløgini
**Kiwanis**

## Grundøkir á Sandvíkahjalla





Ovast á vinnuøkinum á Sandvíkahjalla lýsa vit við hesum tvey óbygd grundøkir til sølu.

Matr. nr. 1 oq, Hoyvík: 7.484 m²

Matr. nr. 2 or, Hoyvík: 3.648 m²

Stykkini liggja lið um lið og kunnu tí seljast saman ella hvørt fyri seg. Tey eru planerað, innigird og liggja væl fyri.

Sambært byggisamtyktini liggja stykkini í 3. grundumráði B7 vinnuøki, sum kann nýtast at byggja hús til stór vinnuvirki, verksmiðjur, goymslur o.t. og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við.

Áhugað kunnu venda sær til okkara fyri at fáa nærri upplýsingar.

**Advokatskrivstovuna, Fr. Petersensgøta 9**

Halgir Winther Poulsen, adv. — Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. — Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. — Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**


## Rentubroyting

Danski tjóðbankin hækkaði tann 28. apríl 2000 diskontoina við 1/4%.

Sum framhald av hesum hevur Føroya Banki broytt rentustig á sethúsalánum, soleiðis at rentan á útláni til 1. veðrætt frá 1. juni 2000 verður 6% p.a.

FØROYA BANKI


## Trøð til sølu



Vit selja eina trøð í Havnardali. Trøðin er 12.930 m². Sambært byggisamtyktini liggur trøðin í 4. grundumráði, sum verður nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt. Servituttir eru eisini tinglýstir á ognini, millum annað at trøðin ikki kann útstykkjast uttan býráðsins samtykt.

Áhugað kunnu venda sær til okkara fyri at fáa nærri upplýsingar.

**Advokatskrivstovuna, Fr. Petersensgøta 9**

Halgir Winther Poulsen, adv. — Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. — Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. — Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**

## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Mazda 323 2.0 Diesel LX – 4 hurðar

**Árg.:** 06.01.1998

**KM:** 58399

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú, og kann síggjast á bilverkstaðnum hjá Símun Paula og W. Berg, 480 Skála.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

tlf. 345600 • beinleiðis 345726
fartelefon 288592 • fax nr. 345607
John Ellefsen
at hitta millum kl. 10.00-12.00

## Lærarar skúlaárið 2000/2001

Søkt verður eftir 4-5 lærarum fyri skúlaárið 2000/2001.

Talan er um vanligar lærugreinir í 1.-10. fl. Tó hava lærarar, sum kunnu undirvísa í motorlæru, fyrimun.

Størvini, sum eru tíðaravmarkað, verða lønt sambært galdandi avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir saman við ljósriti av prógvskjali verða at senda skúlanevndini í seinasta lagi **týsdagin 13. juni kl. 16.00.**

**Fuglafjarðar skúlanevnd**
v/Terja á Lakjuni
FO-530 Fuglafjørður

## Kontorelev på Rigsombudet

Rigsombudet søger en kontorelev indenfor området »Offentlig forvaltning – Stat«. Stillingen ønskes besat 1. august i år eller efter nærmere aftale.

**Vi forventer**

- at du har en god FHS- eller HH-eksamen
- at du er god til at formulere dig mundtligt og skriftligt, på såvel færøsk som dansk
- at du er selvstændig, initiativrig og har gode samarbejdsevner
- at du har kendskab til word eller andet tekstbehandlingsprogram

**Vi tilbyder**

- en god og kvalificeret elevplads med et veltilrettelagt uddannelsesforløb der berører alle Rigsombudets kontorfunktioner
- mulighed for deltagelse i den egentlige sagsbehandling på det familieretlige område
- løn efter overenskomst mellem Finansministeriet og HK-forbundet i Danmark.

For elever med FHS-eksamen er elevtiden 3 år mens den er 2 år for elever med HH-eksamen. Elevtiden omfatter i alt 15 ugers skoleophold i Danmark. Rejse og ophold betales af Rigsombudet.

Du kan få yderligere oplysninger om stillingen ved at henvende dig til kontorfuldmægtig Anna Weihe eller fuldmægtig Hroar Kolmos, Rigsombudet, på telefon 311040, bedst mellem kl. 10-15.

Skriftlig ansøgning med kopi af eksamenspapirer m.v. sendes til Rigsombudet, Postboks 12, 110 Tórshavn. **Ansøgningsfristen er mandag d. 10. juli.**

**Rigsombudsmanden på Færøerne**

**Vibeke Larsen**

**Arbeiðseftirlitið**
Fútalág 1 B • P.O. Box 1134 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 317811 • Fax +298 314489
E-mail: info@arbeidseftirlit.fo
Heimasíða: http://www.arbeidseftirlit.fo

## Trukkskeið

**Vágum 19.-20. juni**
**Suðuroy 29.-30. juni**

Tilmelding á Arbeiðseftirlitinum
tlf. 317811 ella virgar@arbeidseftirlit.fo

## Hár og Smyrsl

Vegna luttøku á skeiði í London verður salongin stongd frá 10. juni til 26. juni.

**Hár og Smyrsl**
v/Biritu Arge
Andrasargøta 11 • 188 Hoyvík
Tlf. 318845

FØROYA LÆRARASKÚLI

## Námsliga útbúgvingin

Vilt tú vera pedagogur?

Nýggjur flokkur verður tikin upp eftir summarfrítíðina.

Umsóknarbløð eru at fáa á Læraraskúlanum (tlf. 313501). Skrivstovan er opin kl. 8.00-16.00.

Treytirnar fyri upptøku á **námsligu útbúgvingina** eru, at umsøkjarin umframt at hava gingið í 9 ár í skúla hevur staðið HF-prógv, studentsprógv, hægri handilsskúlaprógv, hevur lærlingaútbúgving, ella kann prógva samsvarandi kunnleika.

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur starvast í dag- ella bústovni í minsta lagi 1/2 ár.

Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 15. juni.

**Námsliga útbúgvingin**

- ein útbúgving fyri lívið

FØROYA LÆRARASKÚLI

## Læraraútbúgvingin Vilt tú vera lærari?

Nú er tíð at søkja á Læraraskúlan eftir summarfrítíðina.

Umsóknarbløð eru at fáa á Læraraskúlanum (tlf. 313501). Skrivstovan er opin kl. 8.00-16.00.

Treytin fyri upptøku á læraraútbúgvingina er studentsprógv, HF-prógv ella prógv á líknandi stigi.

Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 15. juni.

**Læraraútbúgvingin**

- ein útbúgving fyri lívið

## Frá 1000 ára haldinum

**Framsýningin hjá J. P. Gregoriussen, arkitekti, um kirkjurnar í Føroyum verður í Norðoya Fornminnasavni í Klaksvík frá fríggjadegnum 2. juni kl. 19.00 til 8. juni.**




**FØROYAR KRISTNAR Í 1000 ÁR**

Sosialurin - 311820

## NORÐURLANDAHÚSIÐ

## Tiltøk í juni 2000

Málningaframsýningin hjá Lailu Olsen, Grønland, er í húsinum til og við 4. juni

**Hósdagur 01.**
Kristihimmalsfaradagur. Húsið er opið sum sunnudag.

**Leygardagur 03.**
Hymnologisk Ráðstevna **kl. 09.00**

**Leygardagur 03.**
Kórstevnan 2000. Konsert. **kl. 17.00**
Skráin: Felagskór syngur norðurlendskar sangir, og verkið "Sacre Concert" eftir Duke Ellington verður framført v/ Jaspis og kendu, svensku songkvinnuni Eleonora Johannesson

**Sunnudagur 04.**
Fólkatónleikakonsert v/Piniartut. **kl. 16.00**
Hetta er grønlendskt, finskt, føroyskt tónleikatiltak

**Mánadagur 05.**
Grundlógardagur. Húsið er stongt.

**Leygardagur 10.**
Hvítusunnuaftan. Húsið er stongt.

**Sunnudagur 11.**
1. Hvítusunnudagur. Húsið er stongt

**Mánadagur 12.**
Føroya Symfoniorkestur og kór **kl. 17.00**
framføra verkið Jesus og Makedonarin hjá Paula í Sandagerði og Sigmund Poulsen

**Sunnudagur 18.**
Konsert v/Tórhavnar Manskóri **kl. 16.00**

**Mánadagur 19.-**
WEFTA-Ráðstevna (Fiskur sum matur).
Fyriskipari

**Hósdagur 22.**
Fróðskaparsetur Føroya

**Fríggjadagur 23.-**
Summartónar í Norðurlandahúsinum, ymsastaðni

**Fríggjadagur 30.**
í Tórshavn og á bygd. (Serlig skrá fæst til Summartónar).

**Fríggjadagur 23.**
Summartónar v/Martin Fröst, Svøríki, **kl. 19.30**
og Þorsteinn Gauti Sigurðsson, Ísland

**Sunnudagur 25.**
Konsert v/Joannu Johansen, sopran, **kl. 15.00**
Anne Mette Stæhr, violin og Sunleif Rasmussen, klaver

**Týsdagur 27.**
Konsert v/Austrian Art Ensemble **kl. 19.30**
og Havnarkórinum. Dagmar Hödl syngur mezzosopran

**Mikudagur 28.**
Konsert Håkan Hagegård, baryton **kl. 17.00**
og Elisabeth Boström, klaver

**Fríggjadagur 30.**
A-Capella konsert v/Ginnungagap **kl. 20.30**
og Havnarkórinum

**Norðurlandahúsið inkl. kaffistovan hevur opið**
**yrkadagar kl. 10-18 sunnudagar kl. 14-18.**

**Broytingar kunnu koma fyri. Hoyrið tí ÚF-lýsingar og sí skránna á tekstvarpi í SVF frá s. 650**

**Norðurlandahúsið í Føroyum**
**Telefon 317900 • Fax 319790**
**E-mail: nlh@nlh.fo**
**http://www.nlh.fo**